

*Borðreitt varð til ein 80 fólk í Losjuni í Havn hetta kvølið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Eitt hugnaligt kvøld í Losjuni

**Mikukvøldið beyð Pensjónistafelagið í Havn til hugnaløtu við borðhaldið í Losjuni**

HUGNALØTA

Mikukvøldið hevði Pensjónistafelagið í Havn sína fyrstu samkomu í felagshølinum í Losjuni. Við vældúkaðum borðhaldi, sum limirnir sjálvir høvdu reikað fyri, var høllin fullsett.

Hugagóðir luttakarar afturvið harmoniku ljómi, sum Flóvin Jacobsen lat floyma í høllini, var góður felagssangur.

Formaðurin í Pensjónistafelagnum í Havn, Suni Joensen, hevði framúr góðar inngangsrøðu, har hann í nýtum orðum boðaði frá ætlanum og málum sum felagið fór at leggja fram henda arbeiðsveturin.

Felagið hevði eisini boðið umboðum fyri býráð, bløð o. o. við til samkomuna. Sigvald Kristiansen, landsfelag Pensjónistanna, segði m. a. í røðu síni, at fundur verður í komandi viku í Reykjavík við umboðum úr norðurlendskum pensjónistafeløgum, úr Føroyum verður hann og Suni Joensen.

Eitt sera hugnaligt felagskvøld við vælhýrdum luttakarum.



*Páll Mikkelsen og konan Betta, sum hvødu gullbrúdleyp herfyri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Flóvin Jacobsen spældi undir felagssangin við harmoniku. Suni Joensen, formaður í Pensjónistafelagnum í Havn studerar sangheftið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Sigvald Kristiansen, frá Landsfelag Pensjónistanna, helt røðu. Katrin Dahl Jakobsen, forkvinna í Sosialu nevnd í Tórshavnar Býráð og kona Sigvald, Ása*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Sangurin gekk lystiliga afturvið harmonikutónunum hjá Flóvanum…*

*Mynd: Jens Kristian Vang*